## Kunngerðir og koyrilíkindi á telefonsvarara

Nú ber aftur til at ringja inn á telefonsvarara hjá Landsverki, og tænastan er nú víðkað til at umfata bæði kunngerðir og koyrilíkindir.

Tað einasta, sum tú skalt gera, er at ringja á tlf. 340 802 og fylgja vegleiðingini, so hoyrir tú nýggjastu kunngerðirnar og koyrilíkindini.



## Skutu egin flogfør niður

Í krígnum við grannalandið Georgia seinasta summar mistu russar seks flogfør, sum vórðu skotin niður. Men nú er komið fram, at russar sjálvir skutu trý teirra niður. Tað stendur at lesa í einum russiskum hernaðartíðarriti, sum BBC hevur hugt í. Tað er ein hernaðarserfrøðingur á stovninum Centre for Analysis of Strategy í Moskva, sum hevur sklrivað greinina. Hansara niðurstøða er, at samskiftið millum herin og flogvápnið virkaði ikki nógv væl í krígnum, og at tað hevði álvarssamar avleiðingar við sær. Tað hevur eisini elvt til nógv kjak, hvussu tað bar til, at tann russiski herurin misti so nógv fólk í krígnum, hóast hann var nógv sterkari enn tann georgiski herurin.

# Miðjaðari gjørdur á Kaldbaksvegnum

**Nú verður miðjaðari gjørdur frá Mannbrekku til Sunds. Hetta arbeiðið er ein partur av arbeiðinum at betra um ferðslutrygdina eftir Kaldbaksvegnum**

VEGAKERVIÐ

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Arbeiðið at betra um ferðslutrygdina á teininum frá Kollfjarðartunnlinum og til Havnar hevur nú verið í gongd í nøkur ár og verður ætlandi liðugt samstundis sum síðsti parturin av asfalteringin á teininum verður gjørdur.

Eitt av tiltøkunum at betra um ferðslutrygdina var at gera miðjaðara á teinunum frá rulluportrinum við Sandvíkarhjalla til rundkoyringina við vegin Langa. Miðjaðarin var gjørdur við tveimum miðstrípum við einari frástøðu á umleið ein metur, har tað vóru fresaðar rumlistrípur.

- Enn er ov tíðliga at eftirmeta ferðslutrygdarátakið. Men av tí at tað vísir seg, at fólk eru sera væl nøgd, hevur Landsverk avgjørt at royna hetta átakið eftir øllum Kaldbaksvegnum líka inn á Sund, sigur Landsverk.

### Rumlistrípurnar koma

Sum partur av viðlíkahaldi av landsvegum, var Kaldbaksvegurin í seinastu viku asfalteraður frá Hvítanesi til Sunds. Landsverk avgjørdi tá eisini at mála miðstrípurnar við miðjaðara á hesum teini.

Miðstrípurnar eru nú málaðar frá Mannbrekku til Sunds. Ætlanin er at fara undir at fresa rumlistrípurnar í vegøkslina og í miðjaðaran í næstum.

Av øðrum tiltøkum, ið framd fyri at betra um trygdina á Kaldbaksvegnum, kunnu nevnast trygging av vegamótum, tryggari vegjaðari, rumlistrípur, umfaringarbreyt í Kaldbaksbotni og víkibreyt á Sandvíkarhjalla.



*Miðstrípurnar eru nú málaðar, og rumlistrípurnar koma fyrsta dagin (mynd: Landsverk)*

# Kina forðar atgongd til Twitter og Facebook eftir uppreistrar

**Drápiligir uppreistrar fáa kinverskar myndugleikar at steðga allari ferðslu til netsíður sum Facebook og Twitter, umframt at Youtube leingi hevur verið á svartalista**

SENSURUR

*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

Eftir drápuligu uppreistrarnar í vestara økinum av Xinjiang landslutinum farna vikuskifti, hava kinverskir myndugleikar tikið øll vanlig stig, fyri at forða borgarum atgongd til útlendskar nettænastur.

Fyriuttan at hava kryplað vanliga netferðslu, hava myndugleikarnir eisini steðgað atgongd til Twitter, burturbeint allar tilvísingar, sum ikki frammanundan eru góðkendar, á sterkum leitiskipanum til harðskapin, og hevur eftir øllum at døma nú eisini tikið stig til at forða borgarunum í at rita inn á Facebook frá flestu pørtum at kinverska meginlandinum. Tað skrivar The Washington Post.

Hetta gera kinversku myndugleikarnir helst til tess at betri kunna stýra tíðindaflutninginum út úr landinum, og harvið kunna sensurera tilfar, ið kommunistiska kinverska stjórnin ikki er so fegin um at umheimurin skal síggja.

Fyri bert tveimum vikum síðani høvdu myndugleikarnir forða atgongd til næstan allar Google tænastur, harímillum Gmail, Google Apps og Google Talk.

### Georg Godula frá Web2Asia skrivaði í gjár:

"Frá í dag klokkan 20 kinverska tíð tykist Facebook ikki longur verða atkomuligt frá flestu pørtum av kinverska meginlandinum. Á China Telecom sambandinum á okkara Shanghai kontóri bleiv tænastan burtur umleið 19.45. Vinir í Hong Kong boða frá, at tey kunnu enn sleppa á heimasíðuna."

Ein skjót roynd á WebsitePulse váttar blokaduna av Twitter og YouTube (sum hevur verið forðað í eina tíð nú) og nú eisini Facebook, í øllum førum í nøkrum pørtum av landinum.




*Málið hjá Facebook er kanska at geva fólkinum valdið at deila og lata heimin upp, men tað er júst tað, kinverska stjórnin nú forðar sínum fólki at gera (mynd: www.techcrunch.com)*

# SIC í uppskoti til virðisløn

**Føroyski rockbólkurin SIC er í uppskoti til virðisløn hjá Just Plain Folks, har eisini Lena Anderssen er tilnevnd**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*Eydun@ras2.fo*

Tvey føroysk tónleikanøvn eru í uppskoti til virðislønir hjá felagsskapinum Just Plain Folks, sum er heimsins størsti óhefti tónleikafelagsskapur. Lena Anderssen er tilnevnd til virðislønina sum besti kvinnuligi singer/songwrier.

Og rockbólkurin SIC er í uppskoti til virðislønina fyri Death Metal tónleik.

Sambært fyrireikarunum, so hava heilar 42.000 fløgur og 560.000 løg verið í uppskoti, áðrenn komið er fram til tilnevningarnar.

Heiðurstiltakið verður hildið í Nashville í USA 29. august